# O'Neill í øðini

Venjarin hjá Aston Villa, var ikki blíður, tá hann og lið hansara høvdu tapt Liga Cup finaluna móti Manchester United. Aston Villa kom á odda eftir bara fýra minuttum, og O'Neill var ikki í iva um, at tað skuldi kostað reytt kort til Nemanja Vidic, tá hann framdi brotsspark við at fella ein leysan Agbonlahor. – Eingin hevði mótmælt, um hann gav reytt kort, og avgerðin átti ikki at verið nøkur onnur. Tað var ikki ein serliga skilagóð avgerð frá einum annars fínum dómara, segði Martin O'Neill við ensku miðlarnar eftir dystin.



# Milano liðini á odda

Bæði Inter Milan og AC Milan vunnu um vikuskiftið sínar dystir í Seriu A, meðan aldudalurin hjá Juventus heldur fram. Oddaliðið Inter vóru á vitjan hjá Udinese, og tann dystin vann Inter 3-2. Í Milano tók AC Milan móti Atalanta. Brasilski framherjin, Pato, legði vertirnar á odda bæði 1 og 2-0, áðrenn Valdes minkaði um munin fyri gestirnar. Marco Borriello avgjørdi dystin tá ein góður tími var spældur, tá hann skoraði til endaliga úrslitið 3-1. Juventus datt niður á fimta pláss, tá teir óvanta á heimavølli taptu 2-0 fyri Palermo. Júst Palermo yvirhálaðu Juventus og liggja nú á fjórða plássinum. Inter liggur fremst, fýra stig frammanfyri grannarnir úr AC Milan, sum liggja nummar tvey. AS Roma eru sjey stig frá fyrsta plássinum á triðja plássi.



Owen og Rooney skoraðu hvør sítt mál, tá Manchester United sunnudagin vann sítt fjórða Liga Cup-heitið

# Enn eitt steyp til Manchester United

## Manchester United vann finaluna í Liga Cup kappingini




Heri Simonsen

Við einum 2-1 sigri á Aston Villa eydnaðist tað Manchester United á fjórða sinni í søguni at ogna sær Liga Cup steypið.

Aston Villa byrjaði annars væl, og longu tá fimm minuttir vóru farnir fekk liðið eitt brotsspark. James Milner setti brotssparkið í netið til 1-0 leiðslu, men eitt lítið korter seinni javnaði Michael Owen fyri Manchester United. Michael Owen spældi í gjár ein av sínum besti dystum, síðani hann skifti til Manchester United.

Støðan 1-1 helt sær til eitt korter var eftir av tí vanligu leiktíðini. Tá gjørdi Wayne Rooney - sum ikki byrjaði inni - enn einaferð vart við seg, og hann stútaði sigursmálið hjá Manchester United í netið.

Løtu seinni hevði Rooney aftur ein góðan málmøguleiki, men Brad Friedel í Aston Villa málinum bjargaði meistarliga.

Alex Ferguson hevur staðið á odda fyri Manchester United allar tær fýra ferðirnar, tá Manchester United hevur vunnið Liga Cup kappingina. Fyrstu ferð var í 1992, aðru ferð var í 2006, og triðja ferðin var í 2009.

Hetta er heiti nummar 34 hjá Alex Ferguson, sum venjari hjá Manchester United. Hann hevur vunnið Premier League 11 ferðir, FA Cup 5 ferðir, Liga Cup 4 ferðir, Champions League tvær ferðir, og haraftrat heimsmeistaraskapið fyri felagslið, Charity/Community Shield og europeiska Super Cup steypið.

Telur ein sigrarnir í tíðini, Ferguson var venjari í Aberdeen við, so hevur Sir Alex Ferguson vunnið 44 heiti, og tað verður torført hjá nøkrum at gera honum hetta eftir.

## Flogbóltur

### Eik-ligan, kvinnur

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 16 | 14 | - | 2 | 44 | 11 | 33 | 17 |
| 2 TB | 16 | 12 | - | 4 | 41 | 19 | 22 | 15 |
| 3 Mjølnir | 16 | 11 | - | 5 | 38 | 21 | 17 | 14 |
| 4 Fleyr | 17 | 10 | - | 7 | 35 | 27 | 8 | 13 |
| 5 Dráttur | 16 | 8 | - | 8 | 31 | 26 | 5 | 11 |
| 6 ÍF | 17 | 2 | - | 15 | 7 | 46 | -39 | 2 |
| 7 KÍF | 16 | 0 | - | 16 | 2 | 48 | -46 | 0 |

### Eik-ligan, menn

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 16 | 13 | - | 3 | 41 | 16 | 25 | 19 |
| 2 SÍ | 15 | 11 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 16 |
| 3 Fleyr | 16 | 6 | - | 10 | 32 | 35 | -3 | 8 |
| 4 ÍF | 15 | 0 | - | 15 | 3 | 42 | -39 | 0 |

## Hondbóltur

### Sunset-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 16 | 14 | - | 1 | - | 1 | 468 | 320 | 148 | 29 |
| 2 Tjaldur | 17 | 14 | - | 1 | - | 2 | 499 | 382 | 117 | 29 |
| 3 Neistin | 16 | 9 | - | 0 | - | 7 | 421 | 391 | 30 | 18 |
| 4 VÍF | 16 | 5 | - | 0 | - | 11 | 386 | 447 | -61 | 10 |
| 5 StÍF | 16 | 4 | - | 0 | - | 12 | 379 | 477 | -98 | 8 |
| 6 VB | 17 | 2 | - | 0 | - | 15 | 361 | 497 | -136 | 4 |

### Atlantic Airways-kappingin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 16 | 13 | - | 0 | - | 3 | 519 | 423 | 96 | 26 |
| 2 KÍF | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 412 | 433 | -21 | 15 |
| 3 Kyndil | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 383 | 432 | -49 | 15 |
| 4 VÍF | 16 | 7 | - | 0 | - | 9 | 470 | 460 | 10 | 14 |
| 5 H71 | 16 | 5 | - | 3 | - | 8 | 429 | 442 | -13 | 13 |
| 6 StÍF | 16 | 6 | - | 1 | - | 9 | 418 | 441 | -23 | 13 |

## Máltindarnir, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 177 (15) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 116 (23) |
| Liljan Djurhuus | VÍF | 111 (33) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 103 (21) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 101 (18) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 98 (18) |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 67 (3) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 67 (18) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 62 |
| Fríðrún B. Danielsen | StÍF | 54 |
| Una Egilsdóttir | VB | 54 (15) |
| Adriana Bobra | StÍF | 54 (29) |
| Heidi Joensen | VÍF | 53 (7) |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 52 |
| Svava Vestergaard | VB | 52 |

| Atlantic Airways-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| David Edvardsen | Neistin | 128 (28) |
| Sámal Joensen | VÍF | 104 (32) |
| Poul Kjartan Dam | H71 | 103 (15) |
| Cristian Preda | StÍF | 100 (6) |
| Bjarti Hansen | VÍF | 89 |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 85 (29) |
| Finnur Hansson | Neistin | 78 (11) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 75 (1) |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 74 (28) |
| Ási Dam | KÍF | 66 (39) |
| Høgni Klein | Kyndil | 64 |
| Niklas Reginsson | KÍF | 64 (7) |
| Janus Sørensen | H71 | 63 |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 63 (1) |
| Agnar Joensen | VÍF | 62 (6) |